# Ryds smíðar aftur bátar

Fyri fimm mánaðum síðani gavst svenska bátavirkið Ryds at smíða bátar, tí marknaðurin var steðgaður upp. Men tá virkið luttók á einari stórari bátastevnu í Gøteborg herfyri, var so stórur áhugi fyri Ryds-bátunum, at eigararnir hava gjørt av at seta fulla ferð á virkið aftur. Teir næstu mánaðirnar skal Ryds smíða og lata ikki færri enn 1.000 bátar. Tað var serliga ein 20 føtur stórur bátur, sum vakti ans á bátastevnuni í Gøteborg, og leiðslan á bátasmiðjuni gleðir seg til at sýna bátin fram á bátastevnuni í Stockholm, sum verður í næstum, og sum er landsins største.





*Stjórin á Fiskaaling, Ingolf Joensen, við diplominum, sum staðfestir ISO-góðkenningina. F.v: Símun Hammer, stjóri í Virkisráðgevingini, Ingolf Joensen, Øystein Patursson, góðskuleiðari hjá Fiskaaling, Janet Fríða Johannesen, nevndarforkvinna í Fiskaaling og Andrass Joensen, Det Norske Veritas í Føroyum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fiskaaling leggur dent á gransking

**Fiskaaling hevur sett sær stór mál, og visjónin er at økja um dygdina í føroyskari aling við gransking og menning á altjóða støði**

FISKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Alt broytist og flytir seg, og tað hevur Fiskaaling, sum hevur sítt virksemi við Áir, Nesvík og Skopun, eisini gjørt. Sum árini eru gingin, er felagið í nógv størri mun farið undir granskingarvirksemi á altjóða støði innan aling og við atliti til aling.

Í dag hevur Fiskaaling granskingarvirksemi við Áir og í Nesvík, har royndarvirksemi eisini er við toski og kalva. Í Skopun hevur felagið lívfisk við laksi og sílum, meðan lívfiskaarbeiði annars og rogna- og yngulframleiðslan fer fram við Áir.

Visjónin hjá Fiskaaling er at økja um dygdina í føroyskari aling við gransking og menning á altjóða støði.

Felagið leggur dent á altjóða granskingarsamstarv við granskingarstovnar og vinnulív.

## Høvuðsøkini

Sum høvuðsgranskingarøkir, ið felagið ynskir at menna, kunnu eitt nú nevnast: 1) Aling av fiski og øðrum sjódýrasløgum, 2) Aling á streymasjógvi, 3) Fóður, vatn og framleiðsluhættir, 4) Ílegugransking og biotøkni, 5) Matvørugóðska úr aldum fiski og 6) Sjúkufyribyrging, fiskaheilsa og aliumhvørvi.

Hetta eru stór mál at seta sær, og ein liður í øllum hesum er ISO-góðkenningin innan góðskustýring, sum felagið júst hevur fingið.

Góðskustýringin er ein leiðsluskipan fyri framleiðslu- og prosesstýring, sum tað verður rópt. Hendan fevnir eitt nú um politikk, mannagongdir, vegleiðingar og oyðibløð fyri alt virksemi hjá felagnum.

Stjórin í Fiskaaling, Ingolf Joensen, vísir á, at felagið leggur áherðslu á góða verkætlanarstýring innan gransking og menning og á lívfrøðiliga trygd innan lívfiskaarbeiði, rogna- og yngulframleiðslu.

## Veksandi áhugi

Áhugin fyri eitt nú toskaaling er vaksin munandi tey seinastu árini í londunum rundan um okkum.

- Vit hava tí ment eina royndarframleiðslu av yngli undan toski av Føroyabanka, sum er kendur fyri sínar góðu vakstrareginleikar og góðu eginleikar annars.

Stjórin vísir á, at ílegur og vakstrareginleikar hjá toski av Føroyabanka og landgrunninum verða nærri kannaðir í nýggjari Ph.D.-verkætlan, sum verður rópt "Genetic studies of Atlantic Cod".

Fiskaaling arbeiðir eisini við at menna royndar- og starvsstovuumstøður til altjóða støði.

- Innan ílegugransking hava vit bygt eina framkomna starvsstovu við útgerð til ílegukanningar av føroyskum alitilfari. Nú verður starvsstovan eisini víðkað til at fevna um góðskukanningar av aldum fiski. Næsta stig er at seta í gongd gransking innan framleiðsluhættir og aliumhvørvi við feltroyndum og teldumodellum, sigur Ingolf Joensen, stjóri.

## Tríggir granskarar

Á Fiskaaling starvast tríggir granskarar við granskaraútbúgving, ein Ph.D.-lesandi, umframt tvey fólk við kandidatútbúgving. Eisini eru tveir granskarar uttanlands knýttir til felagið. Harumframt starvast 14 fólk við drúgvum royndum og ymiskum útbúgvingum og førleikum innan røkt, lívfiskaarbeiði og framleiðslu.

Fiskaaling framleiðir tosk, síl og laks og selir rogn og yngul til føroysku alivinnuna.



*Øyvindur Patursson, sum er granskari og góðskuleiðari hjá Fiskaaling, fer eisini at hava framløgu á aliráðstevnuni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ella fyritøkan, sum eigur heiðurin.

– Eg haldi, tað er rætt av okkum, sum hava hjálpt til at røkka góðkenningini, at vit halda okkum í bakgrundini, tí tað er felagið, sum hevur gjørt arbeiði og eigur heiðurin.

Hann segði, at Virkisráðgevingin saman við Fiskaaling hevur sett nakrar rætningslinjur út í kortið.

– Men vit sum ráðgevar klára ikki einsamøll at fáa eina ISO-góðkenning undir land. Vit hava bara peikað, men tað eru tit, sum hava gjørt arbeiði. Eg haldi, at tit, sum standa aftanfyri Fiskaaling, hava gjørt eitt dygdargott arbeiði, og eg haldi eisini, at hetta hevur gingið lutfalsliga skjótt.

Símun Hammer helt, at ein slík góðkenning eisini er kærkomin á tann hátt, at Fiskaaling soleiðis kann vísa tí almenna, sum játtar pening til virksemið, at nakað fæst fyri hesa játtan, sum hann tók til.

Hýrurin á fólki var góður við hátíðarløtuna við Áir týsmorgunin.

## Fiskaaling

P/F Fiskaaling varð stovnað í 1970, og Føroya Landsstýri yvirtók allan partapeningin í felagnum í 1973.

Uppgávan var at standa fyri kynbótaarbeiði við laksi og sílum, og at arbeiða við at menna kalva, tosk og onnur nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna.

Endamálini vóru:

- at gera vísindaligar royndir í sambandi við aling av fiski og skeljadýrum
- at bøta um føroyska alitilfarið
- at reka vinnuligt virksemi innan aling av fiski og skeljadýrum